# Hondbóltsstøður

## 1. deild kvinnur

| | | | | vunnin | tapt | mál- | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | | dystir | v - j - t | mál | mál | munur | stig |
| 1 | VÍF | 10 | 10 - 0 - 0 | 287 | 177 | 110 | 20 |
| 2 | Stjørnan | 10 | 8 - 0 - 2 | 273 | 211 | 62 | 16 |
| 3 | Neistin | 10 | 7 - 0 - 3 | 219 | 187 | 32 | 14 |
| 4 | VB | 10 | 5 - 0 - 5 | 243 | 251 | -8 | 10 |
| 5 | Kyndil | 12 | 3 - 0 - 9 | 271 | 310 | -39 | 6 |
| 6 | Sóljan | 10 | 2 - 0 - 8 | 197 | 277 | -80 | 4 |
| 7 | StÍF | 10 | 1 - 0 - 9 | 180 | 257 | -77 | 2 |

## 1. deild menn

| | | | | vunnin | tapt | mál- | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | | dystir | v - j - t | mál | mál | munur | stig |
| 1 | VÍF | 10 | 9 - 1 - 0 | 292 | 230 | 62 | 19 |
| 2 | Neistin | 10 | 8 - 2 - 0 | 307 | 261 | 46 | 18 |
| 3 | H71 | 11 | 5 - 1 - 5 | 299 | 304 | -5 | 11 |
| 4 | StÍF | 10 | 3 - 1 - 6 | 270 | 271 | -1 | 7 |
| 5 | KÍF | 10 | 3 - 1 - 6 | 257 | 278 | -21 | 7 |
| 6 | Tjaldur | 10 | 2 - 2 - 6 | 241 | 277 | -36 | 6 |
| 7 | Kyndil | 11 | 2 - 0 - 9 | 250 | 295 | -45 | 4 |

# Máltindarnir

**Kvinnur:**

| | | | |
|---|---|---|---|
| Simona Dziugyte | Stjørnan | 102 | (28) |
| Lotte Sørensen | Kyndil | 91 | (38) |
| Asta Petrauskine | Sóljan | 90 | (11) |
| Gabriella Fekete | VB | 82 | (21) |
| Ioana Rápa | VÍF | 61 | (15) |
| Annika Ljósstein | Kyndil | 49 | (9) |
| Joan M. Joensen | Stjørnan | 48 | |
| Ileana Manulescu | StÍF | 48 | (4) |
| Katrin á Neystabø | Neistin | 47 | (21) |
| Jacklin Durhuus | VÍF | 46 | (3) |
| Nicoleta Radu | VÍF | 44 | |
| Anna K. Samson | Stjørnan | 44 | (1) |
| Sóley Mikkelsen | VÍF | 44 | (6) |
| Andrijana Milodanovic | Stjørnan | 43 | (5) |
| Birita Wardum | Neistin | 42 | (3) |

**Menn:**

| | | | |
|---|---|---|---|
| Costin Dumitrescu | StÍF | 72 | (22) |
| Sámal Joensen | VÍF | 66 | (12) |
| Bjarni Wardum | H71 | 66 | (13) |
| Halgir Dahl Olesen | H71 | 65 | (10) |
| Finnur Hansson | H71 | 65 | (18) |
| Høgni Klein | Kyndil | 64 | (3) |
| Jacob Jónsson | Neistin | 62 | (7) |
| Heini Joensen | Neistin | 61 | (21) |
| Dragisa Stojovic | Tjaldur | 59 | |
| Ingi Olsen | VÍF | 55 | (7) |
| Dorica Tomic | KÍF | 54 | (15) |
| Iljan Topic | KÍF | 47 | |
| Hans Áki Dal-Christiansen | Neistin | 44 | (6) |
| Jónleif Sólsker | Kyndil | 44 | (16) |
| Artur Johansen | StÍF | 42 | |

Kyndil-KÍF 20-29 (11-14):

# Kyndil fekk frammaná




*Hóast myndin ikki sigur júst tað sama, so høvdu kollfirðingarnir alla tíðina gott tak á Kyndli, og við sigrinum fingu teir lyft seg heilt burtur úr botninum á stigatalvuni*

*Mynd:Álvur Haraldsen*

**Kollfirðingar gjørdu bart, tá teir vóru í Havn leygardagin. Uttan nakran sum helst iva tóku teir stigini frá Kyndli, og lyftu harvið seg sjálvar á stigatalvuni**

HONDBÓLTUR – MENN
*Jákup Mørk*

Talan var um at kall avgerandi dystin í botnstríðnum, tá KÍF vitjaði Kyndi leygardagin. Serstakliga fyri Kyndi ler hetta ein óhugsandi leiklutur, men eftir tapið leygardagin mugu teir bara ásanna, at hetta tykist verða leikluturin tað, sum eftir er av árinum.

### Lítil spenningur

Tað sást beinanvegin, at tað so undir øllum umstøðum fór at verða trupult hjá Kyndli hendan dagin. Kollfirðingar løgdu bragdliga fyri og vunnu seg nøkur mál framum, og hesa fyrstu løtuna hevði Kyndil als ikki tak á verjupartinum.

Grøna heimaliðið fekk tó skil á aftur, og hevði strítt seg upp á javnt, tá ein framúrskúrandi trippelbjarging frá Óla Christiani mest sum tók pippið frá teimum. Gestirnir vunnu seg nú upp á 8-4 áðrenn nakað aftursvar kom, og restina av dystinum hildu teir fast um leiðsluna.

Bert ta einu ferðina var Kyndil um at skapa eitt sindur av spenningi í aftur dystin. Seinastu góðu 10 minuttirnar fóru teir undir at mansverja bæði Iljan Topic og Durica Tomic, og brádliga fór leiðslan at minka.

Kyndil skeyt seg skjótt frá 17-25 upp á 20-25, men tá Jónleif Sólsker so brendi ein møguleika av sjeymetra strikuni, fór gassið líka sum úr ballónini. Kyndilsleikararnir ásannaðu, at heldur ikki í dag skuldi tað verða. Kollfirðingar nýttu eitt time-out til at fáa skil á aftur, og seinastu løtuna kundu teir við fýra málum á rað staðfesta sigurin.

### Profilarnir

Tað, sum serliga gjørdi munin millum tey bæði botnliðini leygardagin var, hvussu lyklaleikararnir á báðum liðum royndust.

Hjá kollfirðingum vóru hesir eyðvitað teir báðir útlendingarnir, og teir sýndu seg veruliga sum berandi kreftir hendan dagin. Ikki bara skutu teir nógv mál. Við hóttanini frá skotstyrkini kundui teir alla tíðina kundu teir alla tíðina vera við til at leggja trýst á kyndilsverjuna, og tá hendan alla tíðina hevði trupulleikar av at flyta seg rætt, stóðust alla tíðina hol av, sum hvørgin av annars væl leikandi málverjunum kundi gera nakað við.

Heldur ikki skerst tað burtur, at tað kemur væl hjá kollfirðingum, at Eddie Joensen nú aftur er farin undir hondbóltin. Kanska er dystarvenjingin enn ikki hin rætta, men spælskilið er tó somikið gott, at hann í øllum førum ger góða nyttu, og verjuni er hann eisini sera stinnur.

### Má betrast

Hjá Kyndli er stórur partur av spælinum vanliga bygt kring leikandi venjaran, Jónleif Sólsker, men sum er, fær hann ikki spælt við fullari ferð, og tá er neyðugt, at aðrar kreftir taka yvir.

Í fyrsta lagi eru hesar kreftirnar ávíkavist Høgni Klein og Janus Einar Sørensen, men hvørgin teirrra hevði nakran góðan dag leygardagin. Saman við restini av liðnum høvdu teir trupulleikar í verjupartinum, og í álopspartinum hava teir neyvan sjálvir tal á, hvussu nógvir bóltar vórðu antin tveittir burtur, ella skotnir við síðuna av. Tá hesir høvuðsmototarnir hjá liðnum ikki koyra, er ilt at gera nakað sum helst, og so gjørdi tað sjálvandi ikki støðuna betri, at Bárður Johannesen var leikbannaður. Fyri Kyndil er bara at vóna, at teir kunnu lyfta seg meira, tá liðið komandi vikuskiftið skal inn á Skála til ein dyst, sum hóttir við at leggja enn meira sjógv niður til botnin.

Ikki minst er týdningurin av hesum dystinum hjá Kyndli stórur, tí kollfirðingar samstundis fáa vitjan av Tjaldri. Tapir Kyndil kann úrslitið av hesum dystinum merkja, at annar parturin gerst enn leysari í botninum, soleiðis at leiðin hjá Kyndli upp av dumpiplássinum gerst enn longri.

### Dysturin í tølum

**Kyndil-KÍF 20-29 (11-14)**

Málskjúttar:

Kyndil: Høgni Klein 5, Jónleif Sólsker 4(1), Janus Einar Sørensen 3, Rói Árting 2, Allan Mørkøre 2(1), Regin Johannesen 2, Leif Mikkelsen 1, Niels Viggo Niclasen 1

KLÍF: Durica Tomic 9(3), Iljan Topic 9, Petur Martin Pouslen 5, Jákpu Dam 3, Regin Petersen 2

Brotskøst: Kyndil 4, KÍF 3

Útvísingar: Kyndil 4, KÍF 2

Dómarar úr StÍF: Pole Hansen & Jústines Justinussen. Tóktist ov linir, og í øllum førum tvær ferðir kundi reyða kortið verið drigið fram, uttan at hetta tó varð gjørt.



## Minningarorð um

# Ragnar Samuelsen



Týsdagin 13. november fingu vit deyðsboðini av Ragnar Samuelsen, fyrrverandi sýslufulltrúa í Klaksvík. Hóast vit vistu, at Ragnar var sjúkur, komu deyðsboðini dáttliga. Minni enn tvær vikur undan deyðadegnum segði hann mær, at hóast læknarnir høvdu staðfest herviliga sjúku, so føldi hann seg als ikki sjúkan, hann livdi stak væl, segði hann.

Ragnar varð borin í heim í Klaksvík 16. september 1931. Foreldur hansara vóru Anna Maria Eliasen, ættað úr Útistovu í Vági og Johan Samuelsen, ættaður úr Hvalba, og vanliga nevndur Suðuroyar-Johan. Tey giftust í 1914 og búsettust í Kvíggjaklovanum heimi í Vági. Børnini hjá Mariu og Suðuroyar-Johan vóru seks í tali. Tvær gentur og fýra dreingir. Ragnar var næstyngstur.

Í 1954 giftist Ragnar við Sigrid Sørensen av Viðareiði. Sigrid varð fødd og vaks upp Undir Hoy-garðinum á Viðareiði. Sigrid og Ragnar fingu trý børn. Dóttrina Elisabeth, sum býr í Havn, og synirnar Johan, sum býr Undir Brúnni í Klaksvík og Andras, ið eins og systirin er búsitandi í Havn. Barnabørnini hjá Sigrid og Ragnar eru fimm í tali.

Í 1948 fór Ragnar til Danmarkar at fáa sær útbúgving innan skrivstovuyrkið. Afturkomin fekk hann starv sum skrivstovumaður á Norðoya Sýslu. Hetta var í 1950. Tvey ár seinni varð hann settur í starvið sum sýslufulltrúi. Ragnar var í starvi á Norðoya Sýslu í samfull 35 ár. Av heilsuávum fór hann úr starvinum í 1985. Í hesum 35 ára langa tíðarskeiði var Ragnar fleiri ferðir settur sýslumaður í Norðoyggjum.

Ragnar røkti eisini onnur álitisstørv. Tá fyrsta kommunala líkningarnevndin varð vald í Klaksvíkar kommunu í 1958 varð hann saman við Dániali Nielsen valdur at umboða javnaðarflokkin í nevnd-ini. Hann varð afturvaldur á beinleiðis vali í 1962. Til valið í 1966 tók Ragnar ikki við uppstilling. Miðskeiðis í áttatiárunum varð Ragnar valdur í landsskattanevndina, og í nøkur ár var hann for-maður í nevndini.

Alt skrivligt arbeiði fall sera lætt hjá Ragnari. Mong eru tey, sum gjøgnum árini hava leitað til hansara fyri at fáa eina hjálpandi hond. Og hann var altíð fúsur at hjálpa. Ongin fór óhjálptur frá hansara durum. Tað kundi vera sjálvuppgávan, ið skuldi skrivast, ein umsókn, eitt skeyti, eitt testamenti ella eitt gávubræv. Tær drúgvu royndirnar á sýsluskrivstovuni høvdu givið honum sera góðan førleika til alt tílíkt.

Ragnar var fróðarmaður. Hann var hugfarsligur og skemtingarsamur at vera saman við. Hann var vitugur og sera gløggur. Hann fylgdi væl við í so at siga øllum viðurskiftum bæði her heima og úti í stóru verð. Fiskiskapur og politikkur høvdu hansara stóra áhuga. Hann hevði altíð eina dagførda vitan um fiskiskap hjá bæði smærri og størri fiskiførum úr Klaksvík. Somuleiðis hevði hann eina dagførda vitan um politisku viðurskiftini bæði her heima og í okkara grannalondum

Í 1955 varð Ragnar valdur í nevnd Norðoya Javnaðarfelags. Tá síggja vit fyri fyrstu ferð hansara eyðkendu og vøkru hondskrift í gomlu gerðabókini hjá felagnum, sum á fyrsta sinni varð skrivað 4. januar 1936, tá Norðoya Javnaðarfelag varð stovnað. Ragnar var hugsjónarmaður og ein sannførdur javnaðarmaður. Mær og javnaðarflokkinum í Norðoyggjum var hann ein hollur og dyggur stuðul. Ein góður rágevi og ein trúfastur vinur, sum eg sakni og fari at sakna avbera nógv.

Ragnar hevði framúr góðar skaldagávur. Tey vóru mong, sum gjøgnum árini heittu á Ragnar um at yrkja sangir til rundar føðingardagar, brúdleyp, silvurbrúdleyp og aðrar merkisdagar. Og við sínum frammúr góðu skaldagávum rakti hann seymin á høvdið hvørja einastu ferð. Sjálvur segði hann fyri mær, at skaldagávurnar hevði hann arvað úr faðirættini og vísti á, at faðir hansara, Suðuroyar-Johan og Hans Jacob í Stovuni úr Skálavík – skaldið Heðin Brú, vóru systkinabørn. Fyri umleið 22 árum síðani var eg saman við Ragnari inni á gólvinum hjá skyldmanni hansara, Heðini Brú.

Ragnar hugsaði nógv um tey minni mentu í samfelagnum og tosaði altíð teirra søk. Hann hevði hjartað á røttum stað. Tá faðir mín andaðist fyri fýra árum síðani, ringdi Ragnar til mín og helt fyri, at tað var ógrundað at leggja blómur og kransar fyri nógvan pening út á kirkjugarðin, og bað meg heldur biðja tey, sum ætlaðu at senda blómur ella krans, at geva eina peningagávu til grunnin fyri óarbeiðsførar fiskimenn. So varð gjørt. Og nú Ragnar sjálvur fór, varð biðið um, at tey, sum ætlaðu at senda blómur ella krans, skuldu lata eina peningagávu til Herbergið hjá Frelsunarherinum.

Ragnar var kønur í skriftini, hann dugdi mest sum halgubók uttan at, og nýtti ofta endurgevingar úr Bíbliuni. Hann hevði eisini lætt við at sláa upp í salmabókini fyri at finna ein sálm. Og tá tú tosaði við Ragnar, legði tú til merkis, at hann sat undir hvørjum orði, tá talan var um útvarpsgudstænastur og morgunlestrar í útvarpinum. Hann hevði stóran áhuga fyri kirkjum, altartalvum, doypifuntum og tílíkum. Hetta kom til sjóndar, tá hann fyri nøkrum árum síðani hevði eina greinarøð í Sosialinum um kirkjurnar í Føroyum.

Vit eru mong sum syrgja og sakna okkara góða vin Ragnar. Vit drýpa høvur í virðing og takklæti, fyri ta stóru menniskjuna, okkum untist at liva saman við hesi árini. Men størst er sorgin og saknurin hjá tær Sigrid og hjá børnum, verbørnum og barnabørnum tykkara. Vit biðja eftir, at Harrin, sum øllum valdar, má styrkja og troysta tykkum í hesi stór sorg tykkara. Hjá mær persónliga er missurin stórur. Vit báðir Ragnar samskiftu so at siga hvønn einasta dag í eini 30 til 40 ár. Kom at kenna mannin meðan eg enn var smádrongur. Tá plagdi hann av og á at støkka inn á gólvið hjá foreldrum mínum.

Tá eg varð biðin um at koma í sjónvarpið at siga minningarorð um Maritu Petersen, týsdagin 28. august, ringdi eg til Ragnar og segði honum frá hesum, og at hann var vælkomin við onkrum hug-skoti. Tá eg var á veg um Leirvíksfjørð við Dúgvuni ringdi telefonin. Tað var Ragnar. Hann hevði eitt sálmaørindi, sum hann helt vera hóskandi at nýta í endanum av minningarorðunum, og sama sálmaørindi skal eg nýta í endanum av mínum minningarorðum um mín góða og trúfasta vin Ragnar.

*Saknið tungan harmin vekur,*
*at so dátt vit mistu teg.*
*Harrin gevur, Harrin tekur,*
*ei vit skilja Harrans veg;*
*ei á foldum finnist tann,*
*lívsins gátu grunda kann:*
*Best sum sólin fagrast skínur,*
*deyðin inn um dyrnar trínur.*

Við hesum orðum vil eg lýsa frið yvir minni um vinin- og partamannin Ragnar Samuelsen. Hvíl í friði. Harrin goymi sálina.

*Staddur í Havn, 4. desember 2001*

**vinur tín Vilhelm**

# Luciukonsertin í Norðurlandahúsinum

JÓL
*Tíðindaskriv*

Hóskvøldið 13. desember kl. 19.00 verður árliga Luciukonsertin í Norðurlandahúsinum, og eru tað næmingar frá Tórshavnar Musikkskúla og kórið Ung Stjørnuskot, sum fara at verða við á konsertini.

Umframt felagssang og Luciugongd verður eisini krubbuspæl á skánni.

Umframt Tórshavnar Musikkskúla og Norðurlandahúsið eru tað tær báðar Sigrið Sivertsen og Angela Petersen, sum leggja sjálvt Luciutiltakið til rættis.

Atgongumerkir til Lusiukonsertna eru at fáa í Norðurlandahúsinum.

## tíðarbæri

tíðarbærur
skyggir tín
vakurleiki

hár títt sum
bylgjandi
akur

og eygu
tíni vøtn har ið
eg hevði vilja
spælt sum
barn

**Chr.Fróði**

## tosti

tosti.
gleðityngda
søkkandi sorgarvídd.
tigandi tankin.
teskar hann sær
trongliga troyst.
tilveran. ein
sólsetursspurningur
um linkandi stundan
og trega

**Chr.Fróði**

Sosialurin
Lesið Sosialin – tað loysir seg